# Stórarbeiði liggur aftanfyri

**Tað er stuttligt og hugnaligt at vera á summarstevnu. Men tað liggur eitt øgiligt arbeiði aftan fyri einahvørja stevnu, og tað er hugstoytt at síggja, at onnur uttan fyri standandi møta upp á sjálvum stevnunum at fáa sær peningaligan vinning av arbeiðinum, ítróttarfólkini í bygdini gera, siga fyrireikararnir av Vestanstevnuni, sum verður í Sandavági um vikuskiftið**

STEVNA
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Tey leggja hundraðtals arbeiðstímar í stevnuna.

Fólkini aftan fyri ítróttarfelagið í bygdini. Soleiðis at stevnugestirnir kunnu fáa ein góða og hugnaliga stevnu bruturúr. Og ikki minst, so ítróttarfelagið kann fáa nakað at liva fyri í komandi tíðum.

Síðan einaferð tíðliga í januar hevur nevndin í Sandavágs Ítróttarfelag, SÍF, regluliga hildið fund eftir fund til at fyrireika Vestanstevnuna. Finna fram til, hvørji tiltøk skulu vera hjá stevnugestunum at fara til. Hvørji fólk skulu taka sær av hvørjum. Og ikki minst, hvussu alt tað, ið brúkast skal, skal fáast til bygdina. Tí alt má koma av oynni, vísa tey á.Bara tað er stórarbeiði, sum nógv fólk kanska ikki hugsa so nógv um, tá tey fara á stevnu.

### Onnur kráma eftir ágóðanum

– Tí er tað so mikið meira óhugaligt at síggja, at onnur, sum annars avgjørt einki samband hava hvørki við bygdina og als ikki við felagið, sum stendur aftan fyri stevnuna, møta upp, tá arbeiðið er gjørt, at royna at fáa egnan vinning burtur úr tí, sum onnur hava strevast fyri, siga tey, sum standa aftan fyri Vestanstevnuna í Sandavági.

Fyrr var tað soleiðis, siga tey, at ítróttarfelagið átti stevnurnar. Men í dag er tað heilt vanligt, at onnur, sum annars als einki hava við hvørki stevnu ella fyri tann skuld bygdina at gera, møta upp við ymsum sølubúðum og tilboðum av øllum handa slagi at vinna pening burtur úr. Beinleiðis av tí arbeiði, stevnu-fyrireikararnir hava lagt í at fáa fólk til bygdar til at stuðla ítróttarfelagnum.

– Og eingin ivi skal vera um, siga fyrireikararnir av Vestanstevnuni, at okkum dámar tað sera illa.



*Í køkinum í SÍF húsinum eru nógvir tímar brúktir til at fyrireika Vestanstevnuna*

*Mynd: Edvard Joensen*

### Øll bygdin við

Vestanstevnan í Sandavági í ár er øðrum slíkum stevnum lík, soleiðis at skilja, at øll bygdin stendur aftan fyri.

Nevndin í Sandavágs Ítróttarfelag hevur síðan beint eftir nýggjár arbeitt við at leggja høvuðslinjurnar. Síðan eru ymsu uppgávurnar spjaddar út aftur, soleiðis at tá avtornar, er netið, sum heldur stevnuni uppi, rættiliga umfatandi.

Eini 200-300 fólk ella so munnu beinleiðis fara at vera til arbeiðis hesar dagarnar, stevnan verður hildin. Bara til at krevja inn undir kappróðrinum skulu eini 35 - 40 fólk brúkast. Og so kemur alt hitt afturat. Summi skulu syrgja fyri mati til alt róðrarfólkið, sum kemur til bygdina. Onnu skulu passa hoppiborgir og tivoli. Uppaftur onnur skulu standa fyri matsølu út eftir kvøldinum og náttini. Og so framvegis.

Tað skal setast upp og takast niðuraftur. Og ikki minst skal eisini ruddast uppaftur, eftir at stevnan er liðug. Tað er ikki altíð minsta arbeiði av tí.

### Fremmandavitjan

Á hvørjari Vestanstevnu, sum verið hevur seinastu umleið 30 árini, hevur Sandavágur havt vitjan av fólki úr Neskaupstaði í Íslandi. Og í ár verður heldur einki undantak, siga stevnufyrireikararnir. Heldur verða íslendingarnir fleiri í ár, enn teir plaga at vera. Eini 100 fólk eru væntandi við Norrønu fríggjamorgunin.

Og eisini her stendur bygdin aftanfyri. Tí hóast tað er ítróttarfelagið sum stendur fyri stevnuni, er tað kommunan, sum ber kostnaðin av fremmandavitjanini.

Fremmandu gestirnir búgva í skúlanum, men eta hjá privatfólki. Soleiðis er at kalla hvørt hús í Sandavági vertur hjá íslendingunum á Vestanstevnu.

### Lættari og dýrari

Vágatunnilin ávirkar eisini stevnuna, siga fyrireikararnir. Tey vænta fleiri fólk, nú fast samband er. Og tað er eisini í stóran mun lættari at fyrireika ymiskt, tí nú vita fólk, at tey altíð kunnu koma og fara, sum teimum lystir.

Men tað er vorðið nógv dýrari at reka ítróttarfelag í Vágum, síðan Vágatunnilin lat upp, sigur formðaurin í SÍF.

Tí tá siglt varð um Vestmannasund við ferjuni, bar til at nýta teir gjaldseðlarnar, sum avtalaðir vóru millum Strandfaraskip Landsins og Ítróttarsamband Føroya.

Men hesir seðlar eru ikki galdandi fyri tey, sum ferðast eftir privata vegnum hjá partafelagnum Vágatunlinum. So tað er í grundini ein rættiliga stór útreiðsla hjá ítrottarfeløgunum í Vágum, at hendan avtalan er burtur.

Og so er tað eisin vorðið so tvørligt at ferðast við Bygdaleiðum, at tær verða minni og minni brúktar av ítróttarfólki í Vágum.

Eitt nú ber ikki til at fara við bussi úr Vágum inn á Skálafjørðin uttan at fara til Havnar fyrst. Og so er allur dagurin farin til ein dyst, sum, um talan er um eitt nú gentur 12, bara tekur einar 40 minuttir at avgreiða á vølli.






# Vestanstevnuskráin 2003

**Fríggjadagin 11. Juli**

| | |
|---|---|
| 14.00 | Fótbóltur, smágentur SÍF - MB |
| 15.00 | Fótbóltur, smádreingir, FSV a - FSV b |
| 16.00 | Fótbóltur, dreingir, FSV - THRÓTTIR |
| 17.30 | Fótbóltur, gentur 14 - 17, FSV - THRÓTTIR |
| 19.00 | Fótbóltur, Unglingar, FSV -SKÁLA |
| 19.00 | Matsøla/Pylsuvogn við SÍF húsið |
| 20.00 - 23.00 | Tivoli |
| 21.00 | BRJAN Show í høllini á Giljanesi |
| 20.00 - 23.00 | Barnadiskotek í SÍF húsinum |
| 23.00 - 04.00 | Diskotek í SÍF húsinum við D J - Tummas |

**Leygardagin 12. Juli**

| | |
|---|---|
| 9.30 | Fótbóltur, Pinkur, SÍF - SÍ |
| 10.30 | Fótbóltur, Smápiltar, SÍFa - SÍ, og SÍF b - MB |
| 11.30 | Fótbóltur, Piltar, SÍFa - MB, og SÌF b - SÍ |
| 12.00 | Renning. Tilmelding á www.athletic.fo ella við kirkjuna 1/2 tíma áðrenn. |
| 12.00 | Renning fyri vaksin og veteranar, 5 km. Grand prix |
| 12.30 | Dreingir - 7ár og gentur - 7ár.(f.1996 ella seinni) 500 metur |
| 12.40 | Dreingir -10 ár og gentur -10 ár (f.1993-1995) 500 metur |
| 12.50 | Dreingir -13 ár og gentur -13 ár (f.1990-1992) 1000 metur |
| 13.00 | Dreingir -17 ár og gentur -17 ár (f.1986-1989) 1000 metur |
| 13.30 | Skrúðgonga av Giljanesi á Valloyruna, har Rósa Samuelsen, borgarstjóri setur stevnuna. Teknmálstulkur er til røðuna. Sørvágs Tónleikarafelag spælir |
| 13.00 - 19.00 | Kirkjan er opin fyri vitjandi |
| 13.00 - 04.00 | Matsøla í SÍF húsinum |
| 15.00 - 23.00 | Tivoli |
| 15.00 - 21.00 | Hoppiborg, el. tarvur, sumo glíming, skreiðiborg og annað |
| 15.00 - 22.00 | Bátar, fjarstýrdir við Tivoliøki |
| 15.00 - 18.00 | Barnarógving í ánni |
| 14.00 - 18.00 | Matsøla/Kiosk á Bátaplenuni. |
| 15.00 | Sørvágs Tónleikarafelag spælir á bátaplenuni. |
| 15.00 | Kappróður, FM róður og barnaróður. Aftaná verða steypini handaði við Sparikassan |
| 17.00 - 21.00 | Málningaframsýning í Dáanum. Sýndir verða eisini málningar, ið m.a. kend lokal fólk hava málað. Súkklan, ið verður lutað burtur, verður sýnd fram í Dáanum, og møguleiki er at keypa lyklar |
| 17.00 - 18.00 | Høvi verður hjá børnum at mála ein málning. Tiltakið verður i Dáanum |
| 17.00 - 21.00 | "Lofti Design" sýnir fram egið snið í Dáanum, og klokkan 18.15 verður mótaframvísing av klæðunum. |
| 17.00 - 21.00 | MBF tiltak í Sóljugarði. Málningaframsýning við Símun Poulsen, Magna Michelsen og Hermundi Zachariasen. Ymiskt annað áhugavert er eisini at síggja |
| 17.30 | Túnatalv á hondbóltsvøllinum á Valloyruni millum Torkil Nielsen og Olaf Berg. |
| 18.00 | Fótbóltur, steypadystur, 1. Deild FSV - U19. Sørvágs Tónleikarafelag spælir í hálvleikssteðginum |
| 20.00 | Seyðahundakapping á fótbóltsvøllinum |
| 21.00 | Opið hús í Meinigheitshúsinum |
| 22.00 | Meinigheitshúsið hevur sangløtu |
| 22.15 | "Pipar og Salt" í Ítróttarhøllini á Giljanesi |
| 23.00 | Kyndlagonga frá Traðarvegnum oman á Sjóberan |
| 24.00 | Midnáttarrøða, Sonni Smith heldur røðu. Teknmálstulkur er til røðuna. Aftaná verður felagssangur og føroyskur dansur á vøllinum. Fýrverkarí |
| 23.00 - 04.00 | 60 - ára dansur í SÍF húsinum. "TEENAGERS" og " TINGANEST" spæla |
| 24.00 - 04.00 | Stór konsert/dansur í høllini á Giljanesi. Luttakarar: ROK, FLUX og BRJÁN úr Íslandi |

**Sunnudagin 13. juli**

| | |
|---|---|
| 11.00 | Vestanstevnuguðstænasta í Sandavágs kirkju. David Johannesen, prestur prædikar. |
| 12.00 - 19.00 | Kirkjan er opin fyri vitjandi. Klokkan 17.00 er urgutónleikur í kirkjuni |
| 13.00 | Súkklukapping, børn. Tilmelding 1/2 tíma áðrenn við SÍF húsið |
| 14.00 | Súkklukapping, vaksin |
| 14.00 | "Seyðamaðurin á Sondum". Ein útileikur fyri vaksin og børn við sjónleikarum, tónleikarum og dansarum. Byrjar úti á Bakka, heim gjøgnum bygdina og endar á hólmanum í ánni við kirkjuna. |
| 15.00 - 23.00 | Tivoli |
| 15.00 - 21.00 | Hoppiborg, el. tarvur, sumo glíming, skreiðiborg og annað |
| 15.00 - 16.00 | Andlitsmáling á Tivoliøkinum |
| 15.00 - 22.00 | Bátar, fjarstýrdir í ánni við Tivoliøki |
| 15.00 - 18.00 | Barnarógving í ánni |
| 15.00 - 04.00 | Matsøla í SÍF húsinum |
| 15.30 | Fólkafundur í Løgmannsgarðinum. Marjun Sigurdsdóttir heldur røðu. Teknmálstulkur er til røðuna. M'as Blues Band, Vágakórið og felagssangur |
| 16.00 - 20.00 | MBF tiltak í Sóljugarði. - Málningaframsýning við Símun Poulsen, Magna Michelsen og Hermundi Zachariasen. Ymiskt annað áhugavert er eisini at síggja |
| 16.00 - 20.00 | Málningaframsýning í Dáanum. Sýndir verða eisini málningar, ið m.a. kend lokal fólk hava málað. - Súkklan, ið verður lutað burtur, verður sýnd fram í Dáanum, og møguleiki er at keypa lyklar |
| 19.00 | Barnamálningarnir verða sýndir fram og seldir |
| 19.00 | Málningarnir, ið kend fólk hava málað, verða seldir |
| 18.00 - 20.00 | Lyklar til súkkluna verða royndir |
| 16.00 - 20.00 | "Lofti Design" sýnir fram egið snið í Dáanum og klokkan 17.15 verður mótasýning við klæðunum |
| 16.00 - 17.00 | Ponyríðing niðri við kirkjuna |
| 16.15 | Steypakapping millum SÍ, MB, SÍF og Landskrona-landsliðið. Sambadansur við Michelle og luttakarum verður ímillum dystirnar |
| 16.15 | SÍ - Landskrona landsliðið |
| 17.00 | SÍF - MB |
| 17.45 | Finala |
| 18.30 | Brotssparkskapping, Vágatingmenn fyrr og nú |
| 19.00 | Skemt á Valloyruni |
| 19.30 | Útimøti á nullinum. UNGDÓMSKÓRIÐ, TRACE, TÓRFRÍÐ DAVIDSEN luttaka |
| 20.00 | Mannshondbóltur í høllini á Giljanesi, 1. deild STÍF og VÍF |
| 23.00 - 04.00 | Vestanstevnudansur í SÍF húsinum, VILLMENN OG JAVARAR spæla |

Sosialurin 341800